# Reglugerð fyri bátapláss á landi í Tofta havn.

Reglugerðin er galdandi fyri bátar og bátavognar í økjum, sum Tofta havn varðar av í Nes kommunu.

**§ 1** Allir bátar og bátavognar, sum verða settir á bátaøki skula verða merktir við navni og havnamerki.

**§ 2** Ongin bátur má setast á ella flytast av bátaplássunum uttan fyrst at hava boðað Tofta havn frá hesum. Báteigarar skulu boða Tofta havn frá í hvørjum einstøkum føri.

**§ 3** Báteigarin hevur skyldu til støðugt at halda økið kring egnan bát reint og ruddiligt, meðan báturin stendur uppi á landi.
Báteigarin hevur skyldu til at skipa so fyri, at hetta sama økið er reint og ruddiligt, tá ið báturin er farin av økinum aftur.
Bátavognar/stólar hava bert loyvi at standa á økinum, meðan báturin stendur í. Er avtalan ikki hildin, kann Tofta havn rudda fyri eigarans rokning.

**§ 5** Báteigarin hevur treytaleyst ábyrgdina av egnum báti, eisini at hann er skorðaður nóg væl, meðan hann stendur uppi á landi.

**§ 6** Bátarnir kunnu bert standa á økjum, sum Tofta havn hevur ávíst.
Tað er ókeypis frá 1.okt til 30. apríl, og er bert galdandi fyri bátar, sum hava bátapláss.
Kostnaðurin frá 1. mai til 30. sept.:

1. Teir fyrstu 21 dagarnar onki gjald
2. Teir dagar, sum fara yvir 21 dagar, er kostnaðurin sambært gjaldsskrá.

**§ 7** Er tørvurin á bátaplásum á landi størri enn útboðið, kann Tofta havn avmarka tíðarskeiðið fyri, hvussu leingi bátarnir kunnu standa á bátaplássunum, og hevur fulla heimild til at krevja bátarnar fluttar av økinum við 21 daga freist.

**§ 8** Um báteigarin flytir úr Nes kommunu, hevur hesin skyldu til alt fyri eitt at flyta bátin, um plásstrot er.

**§ 9** Henda reglugerð er partur av leigusáttmálanum ímillum Tofta havn og leigaran av bátaplássinum. Brot á hesa reglugerð kann viðføra, at leigusáttmálin verður settur úr gildi ella uppsagdur.

Reglugerðin kemur í gildi tann 1. januar 2015.

**TOFTA HAVN**

________________________